# Debutantur gevur út yrkingarsavn

**Orðini hava tagnarskyldu er heitið á fyrsta yrkingarsavninum hjá 18 ára gomlu Siggu-Mariu Hjalmarsdóttir Højgaard úr Hoyvík. Í savninum eru 19 yrkingar á føroyskum og enskum, og Mentanargrunnur Landsins hevur stuðlað útgávuni**

BÓKMENTIR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hon er fødd og uppvaksin á Landavegnum í Havn, eitt skifti búði hon í Nyborg og tannárini búði hon í Suðri og í Hoyvík. Nú gevur hon sítt fyrsta yrkingarsavn út, "Orðini hava tagnarskyldu". Yrkingar um kenslur, hugsanir og lívið hjá einum ungum føroyskum tannáringi á ferð - í tíð og stað.

– Tað kennist sum ein lætti at sleppa at skriva. Mest fái eg burturúr, tá ið høvdið stendur at bresta.

Sigga-Maria Hjalmarsdóttir Højgaard byrjaði at yrkja longu tá hon var 10-11 ára gomul. Tær 19 yrkingarnar í hesum fyrsta yrkingarsavninum eru eitt úrval úr umleið 70 yrkingum, sum hon hevur skrivað hesi árini. Yrkingarnar eru á føroyskum og enskum máli. Ein spegling av málsliga gerandisdegnum hjá dagsins ungdómi og hennara egnu lívsferð.

– Tað byrjar sum oftast við, at ein setningur kemur til mín, okkurt sum hevur ávirkað meg, og tað byggi eg so á. Fyrst má tangin fyllast við hugskotum. So kann eg fara at tappa. Tí skrivi eg í tíðarskeiðum, tá okkurt avgerandi er hent. Okkurt, sum ávirkar meg. Síðani festi eg kenslurnar á blað.

Yrkingarsavnið "Orðini hava tagnarskyldu" er givið út við figgjarligum stuðli úr Mentanargrunni Landsins í sambandi við, at grunnurin letur stuðul til ungar føroyskar útgevarar. Savnið er sett upp og prentað á Føroya Prenti. Permumyndina hevur høvundurin málað. Savnið fæst til keyps í bókabúðum í Havn í næstum og kostar 60 krónur.



– Ein góð yrking er ein, sum tú fært í høvdið og ikki kanst sleppa fyrr enn hon er skrivað niður. Hesar yrkingarnar eru ikki bara um meg sjálva. Eg fái eisini íblástur av umstøðunum og viðurskiftunum hjá øðrum. Sum ungur stendur tú ofta í nýggjum og ókendum støðum. Yrkingarnar í hesum savni eru um nakað av tí, sum hendur í huganum hjá einum ungum menniskja í dag; kenslur, hugsanir og lívsins stóru spurningar.





STEPHANSSONS HÚS 314291

## Hevur tú áhuga fyri føroyska vinnulívinum?

***Vil tú vera við til at menna vinnulívið, so tað verður sterkari her heima og á altjóða pallinum?***

**Starvið**
Vit sóknast eftir einum samstarvssterkum fulltrúa til menningardeildina í Vinnumálaráðnum. Tú kemur at taka tær av at menna vinnulívið og lóggávuna á hesum øki.

Arbeiðið krevur gott yvirlit og evni til at halda fleiri bóltar í luftini í senn. Ítøkiligar uppgávur eru í løtuni m.a. einskilijing av Føroya Tele, Atlantic Airways og Føroya Lívstrygging. Yvirtøka og útbygging av flogvøllinum, dagføring av vinnulóggávum og at smíða nýggjar kappingar- og marknaðarføringarlógir.

**Vit ynskja:**
At tú hevur útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. í stjórnmálafrøði, búskaparfrøði ella løgfrøði. Onnur útbúgving kann eisini lúka krøvini. Persónar við viðkomandi royndum frá almennari ella privatari fyrisiting hava fyrimun.

**Vit bjóða:**
Eitt opið, ágrýtið og fjølbroytt starv í einum góðum umhvørvi, sum tú eisini sjálv/ur er við til at skapa, fjølbroyttar uppgávur í tøttum sambandi við vinnulívið, og eitt starvspláss, sum setur høg krøv um at røkka sett mál.

Setanartreytirnar eru eftir sáttmála millum lønardeildina og viðkomandi fakfelag.

Sendið umsóknina innan 26.2 til vmr@vmr.fo ella Postboks 377, 110 Tórshavn.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Vinnumálaráðið.

*Deildin fyrisitur almenna vinnumenning, lóggávu og vinnuligt undirstøðukervi. Herímillum vinnuframamál, ársroknskaparmál, partafelagsmál, grannskoðanarmál, fjarskiftismál, KT-vinnu, postmál, kappingarmál, marknaðarføringsmál, vega- og havnamál, ferðslu og flogferðslumálkappingar-, ferðavinnu- og menningarmál.*

VINNUMÁLARÁÐIÐ
Tinganes, postsmoga 377, 110 Tórshavn, tel. 356060 vmr@vmr.fo